## Eldradagar

Leygardagin 8. august skipar Sunda Pensjónistafelag fyri eldradegi í Leguhúsinum í Nesvík. Dagurin varar frá klokkan 9 á morgni til klokkan 17. Millum røðararnar eru Sofus Johannesen, bygdaráðslimur í Sunda kommunu, Jørgen Niclasen, uttanríkismálaráðharri, Edmund Joensen, fólkatingslimur, og Petur Martin Rasmussen. Eisini verður felagssangur við harmoniku og annað undirhald. Allir pensjónistar eru vælkomnir, eisini teir, sum ikki eru í nøkrum felag. Boðast skal frá luttøku í seinasta lagi mánadagin 3. august hjá: Hanna Hansen, tlf. 422151/271073, Marjun Thomassen, tlf. 422376/281205 ella Bjørgheðin Jacobsen, tlf. 422089/508049. Kostnaðurin er 250 krónur.



## Seglloftið spílar seg út

Mánakvøldið 20. juli 2009 stílar Skipalisti Føroya fyri spurnarkapping á Seglloftinum. Seglloftið verður gjørd um til spurningarkappinga - kafé so høvi verður at fáa sær ein drekkamunn afturvið spurningunum. Tiltakið er ókeypis og byrjar kl. 20.00. Øll eru hjartaliga vælkomin! Ónskvøldið 22. juli kemur prísmóttakarin og tónleikasnillingurin Stanley Samuelsen at hava konsert á Seglloftinum. Óneyðugt er at lýsa Stanley við orðum her inni. Komið og upplivið hann og njótið løtuna saman við honum í hugnaligum umhvørvi og fáið ein kaffimunn afturvið konsertini! Stanley byrjar kl. 22.00. Atgongumerki fáast við dyrnar og ØLL eru hjartaliga vælkomin.

## Breiðir seg skjótari í Føroyum

**Føroyingar eru í eini serstakari støðu í mun til onnur lond tá tað kemur til smittuvanda. Tí kann tað væntast at H1N1 breiðir seg skjótari – og doyr út fyrr – enn í øðrum londum**

H1N1
*Rógvi Nybo*
*Rogvi@sosialurin.fo*

Tað eru stór líkindi fyri at H1N1 er at breiða seg nógv skjótari í Føroyum enn í øðrum londum. Sambært William Smith, smittuverjuserfrøðingi, eru fleiri orsøkir til tess.

- Fyri tað fyrsta er tað onga aðrastaðni vanligt at næstan hálva tjóðin savnast á einum stað til eitt tiltak, líka sum midnáttarsangurin á Ólavsøku. Hetta vildi svarað til at tú savnaði 3 milliónir danir á einum stað, greiðir William Smith frá.

Ein annar faktorur, ið ger seg galdandi, eru vegirnir inn og út úr landinum.

- Her er bara ein flúgvari, og bara eitt skip, og hetta eru sovornir fløskuhálsar sum vit øll skulu gjøgnum. Eitt annað eru vanarnir hjá føroyingum við bæði at ganga inn til hvønn annan, ið gera, at ein kann vænta sær at smittan breiðir seg skjótari í Føroyum enn aðrastaðni, sigur William Smith.

- Men hinvegin kunnu vit so eisini vænta, at hon fyrr doyr út í Føroyum. Hetta krímið er sum onnur krím, at tað doyr út av sær sjálvum og sostatt sleppa vit nokk av við hana skjótari enn onnur lond, sigur William Smith, ið er smittuverjuserfrøðingur.



*Ólavsøkusnapsurin er ikki nóg sterkur til at taka lívið av smittubakteriunum. Tá skal styrkin upp á eini 70 til 80 prosent , og tá er tað ikki drekkandi. Tí er ólavsøkusnapsurin í allar hægsta grad ein smittukelda, sigur William Smith, smittuverjuserfrøðingur*
*Mynd: Beinta Haraldsen*

# Snapsurin tekur ikki lívið av H1N1

**Á ólavsøku gongur fløskan ofta títt munn av munni. Ein kundi freistast at hildið, at alkoholið í snapsinum tekur lívið av smittuni, men so er ikki. Sosialurin hevur tosað við smittuverjuserfrøðing, um hvussu tú best sleppur undan at verða smittaður á ólavsøku**

H1N1
*Rógvi Nybo*
*Rogvi@sosialurin.fo*

- Skal tú sleppa heilt undan at verða smittaður, so eru einastu hyggjuráðini bara at vera heima á ólavsøku. Tað er ikki serliga nógv annað at gera. Men tað vita vit, eru ikki eini ráð, sum føroyingar kunnu brúka til nakað sum helst. Tað sigur William Smith, smittuverjuserfrøðingur, um hvussu vit best sleppa undan at verða smittað við H1N1 á ólavsøku, ella á øðrum summartiltøkum yvirhøvur.

Hóast H1N1, populert kallað svínakrím, bert er at meta sum eitt vanligt krím, ið vanlig frísk fólk ikki eru í nøkrum lívsvanda av at fáa, eru tað ikki øll, ið halda tað verða ynskiligt at liggja sjúkur á hásumri.

Hóast einasta garantiið fyri ikki at verða smittaður, er at verða heima, eru tey, ið hóast alt velja at fara á ólavsøku, ikki heilt ráðaleys.

Nøkur vanlig ráð eru, hvussu ein best sleppur undan at verða smittaður við H1N1 ella øðrum krími.

### Lógvatak ein arvasynd

Ein tann fyrsti feilurin, tú kann gera, um tú ikki vil verða smittaður av onkrari influensu, er at taka í hondina á fólki.

- Tú heldur jú hondina fyri tá tú hostar og nýsur, og tí er hondin tann størsti smittuberin. Tí er tað eisini eini góð ráð at vaska hendurnar ofta við vatni og sápu, greiðir William Smith frá.

Eini onnur ráð eru at halda seg burtur frá fólki, ið hava sjúkueyðkenni, so sum at hosta og annað.

- Tey, sum hava sjúkueyðkenni eiga kanska eisini at hugsa um ikki at fara út í størri mannamúgvur, sigur William Smith.

### Snapsurin sterkari enn krímið

Ein annar siður, ið føroyingar hava, er at hava eina lummafløsku hjá sær og at bjóða vinum og kenningum. Hetta er sambært William Smith eisini í allar hægsta grad ein smittukelda.

Er alkoholið ikki nóg sterkt til at drepa bakteriurnar?

- Nei, vanligt alkohol er ikki nóg sterkt til at drepa bakteriurnar við. Tá skulu vit upp á eini 70 til 80 prosent styrki, og tað vita bæði tú og eg er ikki drekkandi, greiðir William Smith frá.

Tískil eigur tú kanska ikki at taka av ólavsøkusnapsinum, um tú vil sleppa undan smittuvandanum.

### Droppið maskurnar

Nógv hevur verið tosað svínakrímsmaskur, og vit hava eisini sæð óteljandi myndir av fólki við masku. Men hesar eru ikki til nógva nyttu á ólavsøku greiðir William Smith frá.

- Tú kann sjálvandi verja teg við hesum kolfipurmaskunum, men tær kann tú bara ganga við eina lítla løtu, so má tú skifta hana út.